# ÁRSINS VITANARFRÓÐU

KAPPING 2019/20



## HVUSSU SMAKKAR LUFT? OG SMAKKAR HON ANNARLEIÐIS ANNAÐ UPPÁ HVAR IÐ TÚ ERT?




Granskarar: 7. Flokkur Skúlin á Argjahamri

# INNGANGUR

Vit eru 10 børn í 7.flokki frá Skúlanum á Argjahamri.  Í okkara verkætlan hava vit arbeitt við luft, og hvussu hon smakkar. Vit hava funnið okkum spurningin:
“ Hvussu smakkar luft? og smakkar tað annarleiðis annað uppá hvar ið tú ert?”

Fyri at fáa svar á okkara spurning hava vit verið úti á gøtuni í býnum og spurt fólk har, hvat ið tey halda at luft smakkar av. Vit hava eisini tosa við ein alis og evnafrøðislærara her á skúlanum, sum eitur Trúgvi Hansen. Hann forkláraði okkum um luft, hvat var í henni og hvørjum hann helt at tað smakkaði av.

Vit hava eisini spurt teir flestu flokkarnir her í skúlanum, “um hvat ið tey halda at luft smakkar av, og um ja hvørjum.”

Lærari: Mariann Súsanna Poulsen og Katrine Kjeld

Navn, teldupostur

Luttakarar: Jákup, Jesper, Petur Christian, Nils, Búgvi, Sára M, Sára H, Rannvá, Sunrid og Elsebeth.

Vit loyva, at frágreiðingin verður løgd á gransking.fo, og
at tilfar úr henni kann verða nýtt til marknaðarføring

# INNIHALD

1. Hetta undrast vit á

Møgulig undirpunkt

2. Hví er tað so?

Møgulig undirpunkt

3. Legg eina ætlan

Møgulig undirpunkt

4. Savna upplýsingar

Møgulig undirpunkt

5. Hetta eru vit komin fram til

Møgulig undirpunkt

6. Sig øðrum frá

Møgulig undirpunkt

Fylgiskjøl

## 1. HETTA UNDRAST VIT Á




## 2. HVÍ ER TAÐ SO

Nøkur halda, at luft smakkar øðrvísi í mun til hvar man er

Nøkur í bólkinum hildu at tað smakkaði av salti

Onnur hildu tað smakkaði av C02 og O2

Nøkur hildu tað smakkaði av ongum.

# 3. LEGG EINA ÆTLAN

Fyrst fara vit at hyggja hvat í internetið sigur, hvat luft smakkar av.

Vit fara at vita um vit fáa fatur á onkrum lærara her á skúlanum, sum veit okkurt um okkara spurdóm og spyrja hann um sama spurdóm.

Vit ætla at fara út í býin at spyrja fólk har um hvat ið tey halda at luft smakkar av, og um tað smakkar øðrvísi annað uppá hvar tú ert. Og vit ætla okkum eisini at spyrja børn her á skúlanum um hvat ið tey halda at luft smakkar av og um tað smakkar øðrvísi í mun til hvar ið tú ert.

# 4. SAVNA UPPLÝSNINGAR

Vit hava tosa við ein alis- og evnafrøðilærara á okkara skúla, sum eitur Trúgvi Hansen. Við honum hava vit prøvað at smakkað O2, og tað halda vit smakkar av luft bara meiri reint, tað er ringt at forklára men tað er tað sum vit halda. Vit hava eisini tosa við Trúgva Hansen um hvørjum luft er uppbygd av og hvørjum hann heldur at tað smakkar av. (Sí fylgiskjal 1)

Vit hava eisini verið runt her á skúlanum við spurnabløðum og spurt næmingarnar sum eru her, og so hava vit eisini verið ein túr í býnum og spurt vaksin og ung hvat í tey halda at luft smakkar av og um hon smakkar øðrvísi í mun til hvar man er.

Vit hava tosað við nakrir lærarar, nøkur onnur fólk, og vit hava spurt nógv spurnabløð. Vit hava eisini leita nógv á internetinum.

Fleiri fólk høvdu ymiskar meiningar, nøkur hildu at í onkrum londum smakkaði hon meira tung. Temperaturir og fuktigheit ger mun á smakkinum. Nógv hildu eisini at tað hevði nógv at gera við um tað var heitt ella kalt. Á internetinum komu vit fram til at luft var gjørd av 78,1% frumevni, og 20,9% ilt. Tað síðsta prosenti er argon og vatnguva. Har er eisini nógv onnur sløg av gassi í luftini.

# 5. HETTA ERU VIT KOMIN FRAM TIL

Vit eru komin fram til, at tað er sera ymiskt hvat í fólk halda at luft smakkar av, men tey flestu siga at hon smakkar øðrvísi í  mun til hvar tú ert. T.d í Føroyum smakkar hon ikki av nøkrum serligum, men hon er frísk, og í heitum londum sum t.d. Spania er hon heit og dálka, tí har búgva so nógv fólk. 19 av 41 fólkum hildu at tað smakkar øðrvísi annað uppá um man er tætt við sjógvin og nøkur hildu eisini at tað smakkaði øðrvísi um man var onkrastanið høgt, sum t.d. á einum fjalli.(Sí fylgiskjal 2)

# 6. SIG ØÐRUM FRÁ

Uppgávan kann lesast á gransking.fo

# FYLGISKJØL

1.

Fylgiskjal eitt







2.

Fylgiskjal 2


munur á hvar tú ert
ja
nei


smakkur
ongum
annað